## Buffon aftur bestur

Tað var heimsins besti málverji, sum Rógvi Jacobsen skoraði ímóti, tá Italia í fjør summar vitjaði á Tórsvølli. Altjóða sambandið fyri fótbóltshagfrøðingar hevur fyri fjórðu ferð kosið Gianluigi Buffon úr Italia sum heimsins besat málverja. Hetta er samstundis fjórða árið á rað, at Buffon verður kosin sum besti málverjin, so tað skuldi ikki verið ivi um, at hann er besti málverji í heiminum. Hesa ferð var Petr Cech úr Chelsea nummar tvey, meðan Ikar Casillas og Edwin Van der Saar vóru nummar trý og fýra.



## Keegan aftur í Newcastle

Enska Newcastle leitar í løtuni eftir nýggjum manager at seta fyri júst uppsagda Sam Allerdyce. Og nú verður tosað um, at Kevin Keegan kanska aftur skal til felagið. Keegan var venjari hjá Newcastle í 90'unum, men í '97 segði hann seg úr starvinum av persónligum ávum. Við Keegan við stýrisvølin vann Newcastle seg upp í Premier League og fram millum tey fremstu í enskum fótbólti. Ikki minst takkað verið undirhaldandi og álopssinnaða spælinum, sum Keegan legði fyri dagin.

# Sera stuttur summarsteðgur

**Landskappingin fer í summar bara at halda frí tey bæði síðstu vikuskiftini undan og tað fyrsta eftir Ólavsøku**

FORMULA 2008

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tann tíðin er farin, tá ið tað bar til at vera fótbóltsspælari í fremstu røð og samstundis bar til at halda summarfrí frá fótbóltinum. Serliga hjá teimum, sum eiga altjóða avbjóðingar á, verður summarsteðgurin stuttur.

Sambært uppskotinum til kappingarskrá fyri 2008, sum FSF hevur sent feløgunum til ummælis, so verður tað bara tey bæði síðstu vikuskiftini undan Ólavsøku og fyrsta vikuskiftið eftir Ólavsøku, at eingin Formula fótbóltur verður á hásumri.

15. umfarið verður tað síðsta undan summarsteðginum. Sunnudagin 13. juli verða tríggir teir síðstu dystirnir spældir: ÍF-KÍ, B68-B71 og B36-EB/Streymur. GÍ og Skála fara at spæla leygardagin 12. juli, og longu hósdagin 10. juli fer NSÍ at faa vitjan av HB. At dysturin í Runavík verður framskundaður kemst av, at NSÍ skal luttaka í europeiskum meistarakappingini.

Fyrsta umfarið eftir summarsteðgin verður mikudagin 6. august. Tá sær fyribils skráin soleiðis út: EB/Streymur-NSÍ, HB-GÍ, Skála-ÍF, KÍ-B68 og B71-B36.

### Ofta mitt í viku

Viðhvørt verður tað stutt ímillum umførini í landskappingini. Sjáldsama ofta er ætlanin at spæla landskappingardystir mitt í viku. Hetta kemst ivaleyst av, at páskirnar liggja so tíðliga í ár. Seinnu árini hava fleiri umfør verið á skránni um páskahøgtíðina. Soleiðis verður tað ikki í ár. Páskadagur er sunnudagin 23. mars, og fyrsta umfarið í landskappingini verður eina viku seinni.

Um ætlaða skráin verður veruleiki, so verða tað í 2008 kappingarárinum fimm umfør mitt í viku.

Tað ber stór krøv til spælararnar við sær, og tað sigur seg sjálvt, at tað eisini ber stór krøv við sær til ítróttarpressuna, sum tað verður roknað við skal fylgja við og bæði leggja upp til og eftirmeta einstøku umførini. Fleiri ferðir verður spælt mitt í viku í hægstu summarfrítíðartíð.

Fyrsta ferðin, at fimm dystir verða á skránni yrkakvøld verður mikudagin 30. apríl, sum er kvøldið fyri Kristi Himmalferðardag. So verður spælt mikudagin 21. mai, mikudagin 18. juni og mikudagin 6. august. Síðsta ferðin, at umfar verður mitt í viku verður mikudagin 20. august og hósdagin 21. august, tá ið 19. umfar verður á skránni.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



*Meistararnir úr NSÍ spæla aftur í ár móti B71 í fyrsta landskappingardystinum. Hesa ferð tó á heimavølli*

# NSÍ leggur fyri á heimavølli ímóti B71

**Meistararnir í NSÍ og silvurvinnararnir í EB/Streymi fara at spæla á heimavølli bæði í fyrsta og í síðsta umfari**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein vika ella eitt sindur meiri enn tað er liðin, síðani bestu fótbóltsspælararnir í landinum fóru undir longu og tungu fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið.

Fyrireikingarnar verða fram til vikuna eftir páskir. Páskadagur er sunnudagin 23. mars, og fyrsta umfarið í landskappingini verður vikuskiftið eftir. Fyrsti dysturin verður leygardagin 29. mars, og dagin eftir verða hinir fýra dystirnir í fyrsta umfarinum á skránni.

FSF hevur sent uppskot til skrá fyri 2008 landskappingina til feløgini. Undirstrikað verður, at talan er um uppskot, sum feløgini nú skulu gera viðmerkingar til. Sambært uppskotinum verður fyrsti landskappingardysturin leygardagin 29. mars, tá ið bronsuvinnararnir í B36 ætlast at fáa vitjan av ÍF, sum í heyst flutti upp úr næstbestu deildini og nú skal royna at fóta sær í Formuladeildini.

Sambært uppskotinum hjá FSF ætlast tey fimm feløgini, sum í fjør endaðu omanfyri miðstrikuna, øll at hava heimavøll í fyrsta umfari. Fyrsta takið í royndini hjá NSÍ at endurvinna FM heitið verður á heimavølli ímóti B71. KÍ skal á vitjan hjá silvurvinnarunum í EB/Streymi, HB, sum endaði á fjórða plássi í fjør, fær vitjan av Skála, og uppflytararnir á Toftum, B68, skulu um Gøtueið at vitja GÍ, sum við góðum endaspurti í heyst lyfti seg upp á fimta pláss.

Sunnudagin 6. apríl verður 2. umfar, og tá fáa øll tey, sum ikki áttu heimavøll í fyrsta umfari, fótbóltsvitjan. Einasta undantakið verður Skála, sum eftir vitjanina í Runavík skal til Fuglafirðar. B36 er einasta liðið, sum bæði ætlast at hava heimavøll í 1. og í 2. umfari. GÍ fer at vitja B36 fyrsta sunnudagin í apríl.

Longu í 2. umfari verður klassikarin í Klaksvík millum KÍ og HB, á Svangaskarði verður B68 partur av grannauppgerð ímóti NSÍ, og EB/Streymur fer at vitja á Sandi.

### HB vitjar EBS

Kappingarárið fer sambært uppskotinum frá FSF at enda síðsta leygardagin í oktober, tá ið 27. umfarið verður á skránni.

25. oktober eiga meistararnir í NSÍ – eins og í fyrsta umfari – heimavøll. Talan verður um kommunuuppgerð við Løkin, har Skála fer at vitja.

Tað er framvegis ógvuliga tíðliga á fótbóltsárinum. Eingin venjingardystur er spældur, og tí er eingin orsøk at gera so nógv burtur úr at meta um styrkir og veikleikar.

HB plagar oftast at standa seg væl, og út frá avrikunum síðsta heyst og hvussu teir hava mannað seg undan komandi kappingarári, so er tað lætt at ímynda sær, at silvurvinnararnir í EB/Streymi fara at bjóða seg fram í kappingini um fremstu plássini. Tí kann tað væl hugsast, at talan verður um rættuliga týdningarmikla uppgerð, tá ið HB í síðsta umfari fer at vitja EB/Streym.

Hinir dystirnir leygardagin 25. oktober: ÍF-B71, GÍ-KÍ og B36-B68.

Fótbóltssambandið sigur, at leygardagurin 31. mai og mikudagurin 4. juni eru settir av til at spæla landsdystir í, men at broytingar framvegis kunnu verða gjørdar.